## Nýtt drápsmet

Í meksikanska býnum Ciudad Juárez, ið er kendur sum stríðsstað hjá teimum tiltiknu rúsevnaharkaliðunuum, hava myndugleikarnir nú skrásett 1.701 dráp higartil í ár. Tað er nýtt met, skrivar AP. Seinasta vikuskiftið vórðu 14 fólk myrd í býnum, og í statunum Sonora og Chihuahua, sum hava mark við amerikonsku statirnar Arizona, New Mexico og Texas, vórðu tilsamans 22 fólk funnin myrd. Myndugleikarnir sendu fyrr í ár 8.500 hermenn til Ciudad Juárez í einari roynd at steðga bardøgunum millum harkaliðini Juárez og Sinaloa, sum stríðast um tann lokala rúsevnamarknaðin og smuglingina til USA.



## Villepin í rættin

Fyrrverandi franski forsætisráðharrin Dominique de Villepin er skuldsettur at hava skipað fyri einum átaki, sum hevði til endamáls at spilla Nicolas Sarkozy, forseta út. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í fimm ára fongsul. Villepin heldur uppá, at hann er ósekur, og at hann verður fríkendur í rættinum. Í hansara eygum er taloan um eitt politiskt útspillingarmál. Fýra aðrir menn eru skuldsettir í sama máli, og í fronskum fjølmiðlum verður málið umrøtt sum tann størsta politiska gølan í fleiri ár. Útspillingin, sum málið snýr seg um, var í 2004, tá Villepin og Sarkozy kappaðust um at taka við sum franskur forseti eftir Jaques Chirac.

# Gjald á móðurmálsorðabók var ein misskiljing

**Tekniskir tvørleikar vóru orsøkin til, at gjald herfyri sá út til at vera lagt á vælumtóktu netútgávuna av Móðurmálsorðabókini. Orðabókin verður verandi ókeypis**

ORÐABÓK

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað kom óvart á mong, tá tað herfyri sá út, sum at gjald var lagt á nógv brúktu netútgávuna av Móðurmálsorðabókini. Tá farið varð inn í leitiskipanina á heimasíðuni hjá Orðabókagrunninum var Móðurmálsorðabókin fyrst als ikki tøk. Nakrar dagar seinni stóð at lesa, at tú mátti tekna teg sum haldara fyri at fáa atgongd til leitiskipanina. Nógvir garvaðir brúkarar funnu tó onkran umveg inn til orðabókina, men hjá teimum minni royndu vildi onki bera til. Í gjár visti heimasíðan at siga, at ókeypis atgongd til Móðurmálsorðabókina fekst í nakrar dagar á afturat, men í skrivandi løtu er heimasíðan als ikki tøk.

### Verandi ókeypis

Sambært Saru Joensen, skrivara í Orðabókagrunninum, hevur tað tó ongantíð verið ætlanin at leggja gjald á netútgávuna av Móðurmálsorðabókini. At tað er komið at síggja soleiðis út, hongur saman við ymsum tekniskum tvørleikum, sum komu í, tá fleiri aðrar orðabøkur vóru lagdar út á heimasíðuna herfyri. Hesar mást tú tekna hald til, men atgongdin til Móðurmálsorðabókina verður verandi ókeypis.

- Nevndin í Orðabókagrunninum metir ókeypis atgongdina til Móðurmálsorðabókina vera so grundleggjandi, at tað skal nógv til, áðrenn gjald verður lag á hana. Sjálvt um tað als ikki er vanligt aðrastaðni við ókeypis atgongd til orðabøkur, so halda vit at støðan í hesum førinum er serstøk, sigur Sára Joensen.

Fyrr fekk grunnurin eina fasta játtan, men seinnu árini hava tey verið noydd at søkja um pening á hvørjum ári.




*Vælumtókta Móðurmálsorðabókin á netinum verður verandi ókeypis*

- Tað merkir, at í grundini hava vit onga trygd fyri at hava fáa nóg mikið av peningi til eisini at menna grunnin. Tí er neyðugt at útvega eyka inntøkur, eitt nú við at leggja gjald á aðrar orðabøkur, sigur Sára Joensen.

Orðabókagrunnurin hevur roynt at fáa Mentamálaráði at oyramerkja eina játtan til Orðabókagrunnin, men enn er hetta ikki eydnast. Hartil er peningurin fær, ofta ætlaður eini ávísari orðabókaverkætlan, sum kanska longu er í gongd. Hetta er so aftur við til at avmarka frælsið hjá grunninum at ráða yvir inntøkunum og stinga nýggjar ætlanir út í kortið.

Í løtuni verður til dømis arbeitt við eini dagførdari netútgávu av Móðurmálsorðabókini, sum brúkarar møguliga skulu gjalda fyri. Men eisini tá verður gamla netútgávan av Móðurmálsorðabókini framvegis ókeypis.

# Fimta Heystframsýningin letur upp

**Tríggir gestaframsýnarar eru bodnir við, nú Heystframsýningin letur upp fimta árið á rað**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin letur fimta Heystframsýningin upp í Listahøllini á Skipasmiðjuni.

Eins og undanfarin ár eru gestir bodnir við at sýna fram. Gestaframsýnararnir hesuferð eru Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir og Brandur Patursson, sum bæði vóru við seinasta ár, og Tóroddur Poulsen, ið er við á fyrsta sinni.

Undanfarin ár hevur Grafiski Verkstaður Føroya, saman við einum listafólki úr Heystframsýningarbólkinum staðið fyri, at gera serprent til Heystframsýningina, og hetta gera tey aftur í ár. Í ár er tað listamaðurin Bárður Jákupson, sum ger serprentið.

Tekstin í listaskránni hevur rithøvundurin Oddfríður M. Rasmussen skrivað.

Á Heystframsýningin eru hesi listafólkini við í ár: Andrias Andreassen, Hanni Bjartalíð, Hjördis Haack, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Anker Mortensen, Marius Olsen, Torbjørn Olsen, Bjarne Werner Sørensen, Tummas Jákup Thomsen. Framsýna ikki í ár: Rannvá Kunoy, Olivur við Neyst og Tróndur Patursson.

Gestir: Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir, Brandur Patursson og Tóroddur Poulsen

Í sambandi við at Heystframsýningin letur upp verða tvær konsertir á skránni í Listahøllini. Leygardagin 26. september kl 17 hevur Aldubáran heystkonsert, meðan sangarar úr Tarira og Havnarkórinum hava konsert sunnudagin 27. september kl 17.



*Fleiri av nýggju verkunum hjá Hanna Bjartalíð verða millum listaverkini á Heystframsýningini í ár*



*Tað er forlagið Bókagarður hjá Emil Juul Thomsen sum gevur út bókina um Steffan Danielsen. Kinna Poulsen, listaummælari, hevur skrivað tekstin*

# Nú kemur bókin um Nólsoyarmálaran

BÓK

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyrsta bókin um sermerkta listamálaran úr Nólsoy, Steffan Danielsen, verður nú løgd fram.

Framløgan verður hósdagin frá klokkan 16 til 18 í nýggju hølunum hjá Steinprent á Skálatrøð.

Í hesum sambandi verður høvi at síggja eitt forkunnugt úrval av fimm myndum hjá Nólsoyarmálaranum.

Eisini fara onkur av teimum, sum standa fyri útgávuni, at tosa um arbeiðið við bókini.

Tað er forlagið Bókagarður hjá Emil Juul Thomsen sum gevur út bókina. Kinna Poulsen, listaummælari, hevur skrivað tekstin og John Dalsgarð hevur lagt útgávuna til rættis.

***Brot úr bókini:*** Steffan Danielsen er í orðsins rætta týdningi ein føroyskur málari og tað við øllum teim styrkjum og veikleikum, sum hetta hevur við sær. Eitt er, at myndir Nólsoyarmálarans raka tað serliga gráa í føroyska landslagnum og veðurlagnum so neyvt og ektað sum eingin annar megnar at lýsa tað. Men harumframt tykjast myndir Steffan Danielsens merktar av eini ótilgjørdari eyðmýkt, sum er so egin og at síggja til upprunalig, at hon sýnist púra fyriuttan ta siðmentan, sum í øldir er dyrkað í akademium, konservatorium og universitetum á meginlandinum. Hesar myndir prógva hvussu óstøðgandi og ótamd tann ráa skapanarmegin veruliga er.